# Leiðari og pedagogar

**Býlingshúsið á Norðasta Horni søkir eftir avloysara fyri leiðaran og eftir pedagogum.**

**Størvini**

**Leiðarin**

Býlingshúsið á Norðasta Horni søkir eftir leiðara í eitt ár, tá leiðarin fer á ársskeið á Danmarks Lærerhøjskole. Leiðarastarvið er 40 tímar um vikuna, og verður at seta 1. juli 2000. Uppgávan hjá leiðaranum er at standa fyri tí umsitingarliga og námsfrøðiliga partinum viðvíkjandi stovninum. Leiðarin inngongur í eitt tætt samstarv við aðrar kommunalar dagstovnaleiðarar, umframt umsitingina í Tórshavnar kommunu.

**Pedagogar**

Somuleiðis er nøkur ósett pedagogstørv á barnagarðsstovum og á vøggustovu.
**Barnagarðsstova við 17 børnum.** Pedagogstarv 40 tímar um vikuna, verður at seta 1. mai 2000.
**Barnagarðsstova við 21 børnum.** Pedagogstarv 30 tímar um vikuna, verður at seta 7. august 2000.
**Vøggustova við 11 børnum.** 2 pedagogstørv á 35 tímar um vikuna, verður at seta 7. august 2000.

**Vit bjóða**

Eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur ein stóran leiklut í gerandisdegnum. Dentur verður lagdur á, at tær dámar at vera uttandura í øllum veðri, megnar at skapa ein tryggan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum.

**Setunarviðurskifti**

Størvini verða at seta, sí tær einstøku starvslýsinganar, ella eftir avtalu. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri. Um pedagogur ikki søkir, verður hjálparfólk sett í avmarkaða tíð.

**Meiri fæst at vita**

um størvini við at venda sær til Ásu Egholm, leiðara tlf. 310905, ella Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra, tlf. 315160

**Umsókn**

saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Býlingshúsinum á Norðasta Horni, Granagøta 5, 100 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 25. apríl 2000. Tilskila á umsóknina hvat starv tygum søkja.

Tórshavnar kommuna



---

**Starv**

## Fólk til farmastøðina

Strandfaraskip Landsins lýsa við hesum eftir lastbilførara/farmastøðfólki til farmastøðina í Klaksvík.

**Uppgávurnar hjá farmastøðini**

Høvuðsuppgávan hjá farmastøðini, sum er undir farmaflutningsdeildini, er at fyriskipa, samskipa, viðlíkahalda og menna farmaflutningin millum meginøkið og útjaðarøkini í Føroyum.

Aðrar uppgávur eru:

- Tryggja ein støðugan rakstur av farmaflutninginum
- Kundamóttøka
- Frankering
- Skipaavgreiðslur
- Ráðlegging og samskipan viðvíkjandi koyringini

**Starvið fevnir um**

Høvuðsuppgávurnar hjá lastbilføraranum er at vera við til:

- Farmaflutning og farmaavgreiðslu
- Fylgja uppgávum, málsetningum o.ø. fyri farmastøðina
- Tryggja gott samstarv við kundar, myndugleikar og aðrar samstarvsfelagar
- Vegleiða og upplýsa kundar
- Frágreiðingarskyldu yvirfyri farmastøðleiðaranum

**Førleikakrøv**

- Koyrikort til lastbil/trailara
- Krana- og trukkprógv
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
- Góðan røkjuskap og er kundavinarligur

**Setanartreytir**

Starvið verður sett eftir sáttmálanum hjá Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag.

**Umsóknir**

Umsókn við avriti av prógvum, ummælum, CV og tilvísingum skulu sendast til:

***Strandfaraskip Landsins***
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 23. mars 2000.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú venda tær til Heina á Borg, farmaflutningsleiðara, á

STRANDFARASKIP LANDSINS

*Strandfaraskip Landsins er ein landsfyritøka undir Vinnumálastýrinum / Samskiftisdeildini.*

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

---

## *Søkt verður eftir tilkomnum fólki til handilin, at byrja beinanvegin.*

## *Má kunna arbeiða sjálvstøðut.*

**Shell Quick Service**

Stangavegur • 700 Klaksvík • Tel. 45 61 66 • Fax 45 78 90

Sosialurin - 311820

---

## VENJINGARHØLL Í HOYVÍK

### ÚTBJÓÐING Í TOTALARBEIÐSTØKU

Vegna Tórshavnar Kommunu verður arbeiðið viðvíkjandi bygging av nýggjari Venjingarhøll í Hoyvík hervið boðið út í almenna lisitatión.

Arbeiðið, ið verður útboðið í totalarbeiðstøku fatar um:

(1) Jørð- og kloakkarbeiði
(2) Betong-, timbur-, snikkara- og múrara-arbeiði
(3) Málaraarbeiði
(4) Gólváleggingararbeiði
(5) Vatn-, hita-, sanitet- og ventilatiónsar-beiði
(6) El-arbeiði
(7) Innan- og uttandura innbúgv og útgerð
(8) Byggipláss

Tey, ið hava áhuga í at bjóða, skulu boða frá í seinasta lagi 27. mars 2000. Útbjóðingartilfarið verður sent teim bjóðandi 31. mars 2000 móti krossaðum kekki kr. 2.000,00 sum veðhald.

Lisitatión verður hildin á skrivstovu okkara, Lucas Debesar Gøtu 9 í Havn, mikudagin hin 26. apríl 2000 kl. 15.00.

**Crone & Koch, Føroyar P/f**
Lucas Debesar Gøta 9
100 Tórshavn
Tlf. 31 89 20
Fax 31 89 25

Teldupost adressa: ck@post.olivant.fo

---

## Nýggjur happadráttaseljari

Fyri Turið og Áshild Midjord er

**ÓLUVA D. PERSSON**
Áargeil 21
tlf. 314791
FO-100 Tórshavn

blivin happadráttaseljari.

**Hin føroyski Happadrátturin**

---

## Vrak til sølu

**Merki:** Toyota HI-LUX 2,4 PICKUP 4x4
**Árg.:** 22/04-99
**KM:** 16.405

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

tlf. 448190 • fax 448077
at hitta millum kl. 09.00-11.00
Suni Danielsen

---

## Dagrøktarmamma

Dagrøktin í Eiðis kommunu søkir eftir avloysara fyri dagrøktarmammu í barnsburðarfarloyvi.

Nærri fæst at vitа á tlf. 423488 ella 423555.

**Dagrøktin í Eiðis kommunu**



**Fyribilsstørv**

## FRÍTÍÐARAVLOYSARAR

Við hesum verður søkt eftir frítíðaravloysarum til at avloysa í fyritøkuni í summar frá umleið fyrst í mai til seinast í september.

**Uppgávur á skrivstovuni/upplýsingartænastuni**

Høvuðsuppgávan hjá skrivstovufólkunum er at taka lut í tilrættaløgdum/fyrifallandi skrivstovuarbeiði sum fyriskipað verður av leiðsluni.

**Førleikakrøv**

- Skrivstovuútbúgving e.l.
- Góðan kunnleika til EDV
- Duga væl at málbera seg á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
- Góðan røkjuskap og er kundavinarligur

**Uppgávur hjá buss- og lastbilførarum**

Høvuðsuppgávan hjá bussum og lastbilum er at røkja innanoyggja fólka- og farmaflutningi eftir fastlagdari ferðaætlan og annars aðrar túrar við ferðafólki og farmi kring landið.

**Førleikakrøv**

- Koyrikort til buss/trailara
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
- Góðan røkjuskap og er kundavinarligur

**Uppgávur umborð á skipunum**

Høvuðsuppgávan hjá strandfaraskipunum er at røkja innanoyggja fólka- og farmaflutning eftir fastlagdari ferðaætlan og annars aðrar túrar við ferðafólki kring oyggjarnar.

Umsøkjarar skulu til eina og hvørja tíð kunna verða fluttir millum skipini, sum fyriskipað av leiðsluni.

Arbeiðstíðin er fyriskipað í mun til galdandi ferðaætlan hjá tí skipi, ið ein verður settur umborð á.

**Førleikakrøv**

Umsøkjarar til skipini skulu, umframt galdandi sjóvinnubræv, hava:

- Siglingarbók
- Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð
- Heilsuprógv ikki eldri enn 2 ár
- Sjón- og hoyrnaroynd ikki eldri enn 3 ár
- Roykkavari/sløkkileiðari ikki eldri enn 5 ár
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
- Góðan røkjuskap og er kundavinarligur

**Uppgávur á SL-Verkstaðnum**

Høvuðsuppgávan hjá bilverkstaðnum er at fyriskipa, samskipa og menna tekniska viðlíkahaldið av lastbilum, bussum o.ø. koyriútbúnaði hjá fyritøkuni.

**Førleikakrøv**

- Last/bilmekanikari ella maskinsmiður
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
- Góðan røkjuskap og er kundavinarligur

**Uppgávur hjá farmastøðum**

Høvuðsuppgávan hjá farmastøðunum, sum eru undir farmaflutningsdeildini, er at fyriskipa, samskipa, viðlíkahalda og menna farmaflutningin millum meginøkið og útjaðarøkini í Føroyum.

**Førleikakrøv**

- Koyrikort til lastbil/trailara
- Koyriloyvi til trukk/tugmastara
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
- Góðan røkjuskap og er kundavinarligur

**Løn og setanartreytir**

Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggarmálastýrið og avvarandi fakfelag.

**Umsóknir**

Umsóknir við avriti av próvskjølum, ummælum, CV og tilvísingum skulu sendast til:

***Strandfaraskip Landsins***
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 15. apríl 2000.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Páll Heinesen, starvsfólkaleiðara, á tlf. 343000 ella e-post pah@ssl.fo.

STRANDFARASKIP LANDSINS

*Strandfaraskip Landsins er ein landsfyritøka undir Vinnumálastýrinum / Samskiftisdeildini.*

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

---

# TILBOÐ

## *Í dag og í morgin lata vit:*

## *÷10% av stálvaskum*



## *÷20% av øllum kranum*



*Tilboðini eru eisini galdandi í Runavík teir dagar opið er.*
*Vit hava eisini stórt úrval av bæðirúmsmøblum.*

**VVS-HORNIÐ**
**Lágpríshandil**

Landavegur 2 - 100 Tórshavn - Tel. 318023 - Fax 310963
Runavík • Tel. 447773 *Opið:* Mikud.....13.00-17.30
Leygard. 10.00-14.00

Sosialurin - 311820

---

FØROYA PEDAGOG FELAG

## Aðalfundur

Umboðsráðið boðar til aðalfundar í B36 húsinum

**leygardagin 8. apríl 2000 – kl. 13.00**

Dagsskrá samb. lógum felagsins.

**Umboðsráðið**
**Føroya Pedagogfelag**

---

## Frá 1000 ára haldinum

www.tusund.fo

1000 ára • haldið

**Sunnudagin 19.03** kl. 16.00 heldur Martin R. Jacobsen, prestur, fyrilestur í konfirmantstovuni í Vesturkirkjuni um Ápostólsku fedrarnar.

**Sunnudagin 26.03** kl. 16.00 heldur Martin R. Jacobsen, prestur, fyrilestur í Nor›skála Kirkju um Ápostólsku fedrarnar.

**Mánadagin 27.03** kl. 16.00 heldur Magnus Jørgensen fyrilestur í Glyvra Kirkju um Kaj Munk. Eystankóri› syngur.



RZ009

---

## Umbýti av koyrikortum

Mint verður á, at koyrikort, sum ikki eru í ES-sniði, fara úr gildi við árslok ár 2000 og skulu vera umbýtt áðrenn ta tíð.

Mint verður eisini á, at tey sum ætla sær uttanlands í summar, eiga at umbýta gamla koyrkort sítt í góðari tíð við eitt nýtt koyrikort í ES-sniði. Roknast kann við eini avgreiðslutíð uppá 1 til 2 mánaðir.

Umbýtið fer fram á Bileftirlitinum og uttan fyri Havnina á politistøðunum. Umbýtið er skipað soleiðis, at viðkomandi býtur sítt koyrikort um í sama mánaði, sum føðingardagurin er.

Umbýtið kostar 250 kr., sum skal vera goldið frammanundan, antin í banka ella á posthúsi við umbýti á politistøðunum.

Hav gamla koyrikortið við, væltrofna portrettmynd (hattleys) og møguligt navnabræv, um navnabroyting er farin fram.

Tórshavn, hin 9. mars 2000
**Bileftirlit Føroya**
Hoyvíksvegur 57 • 110 Tórshavn
Tlf. 350400/fax 350401
Teldupostur: bef@bef.fo